# Floksting í Tjóðveldisflokkinum



**Í morgin og leygardagin heldur Tjóðveldisflokkurin floksting í í Bygdarhúsinum í Miðvági, har millum annað nýggjur næstformaður skal veljast fyri Karsten Hansen, ið hevur vent flokkinum bakið**

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

»Tjóðveldisflokkurin vil hava meiri samband við allan heimin« er høvuðsyvirskriftin á flokstingi floksins, ið verður hildin fríggjadagin 23. og leygardagin 24. mars í Bygdarhúsinum í Miðvági.

Onnur mál á skránni eru val av næstformanni eftir Karsten Hansen, sum er farin úr flokkinum orsakað av 266B málinum. Valevni til nýggjan næstformann eru Tórbjørn Jacobsen og Páll á Reynatúgvu.

Flokstingið skal eisini taka støðu til innkomin uppskot um javnstøðupolitikk, nýtt búmerki til flokkin og endurskoðan av floksskipanin.

Á flokstinginum verða eisini vinnararnir avdúkaðir í kappingini hjá Tjóðveldisflokkinum millum ung um at skriva sínar dreymir um einar sjálvstøðugar Føroyar.

Sum vanligt hevur flokkurin eitt serligt evni á skránna, sum gestarøðarar eru bodnir at røða um. Í ár er evnið: »Úr stongsli í samband.«

Í tíðindaskrivi í sambandi við flokstingið skrivar Tjóðveldisflokkurin, at »Allastaðni renna føroyingar seg í forðingar fyri at virka frælst í heiminum og at menna seg við egnum samleika á javnbjóðis støði við onnur. Vinnulívið, mentanararbeiðið og politiska skipanin noyðast at finna vegir út um tær stongdu dyrnar og teir garðarnar, ið støðugt verða laðaðir og noyðast at skifta samleika til tess at kunna virka í altjóða heiminum.«

Tjóðveldisflokkurin hevur boðið tveimum gestarøðarum at siga frá sínum royndum og hugsanum:

Niels Stórá, sum er stjóri í altjóða fyritøku í Íslandi (hjá Jákupi á Dul Jacobsen, blm.), fer at røða um evnið:

»Úr Føroyum til Íslands og út í heim - týdningurin av at vinna í einum sjálvstøðugum landi.«

Beinta Gregersen, leiðari av Virkishúsinum í Klaksvík, fer at siga frá sínum royndum við evninum:

»Er Klaksvík mitt í verðini? – ungdómsmentan og føroyskt mentanararbeiði í altjóðagerðini.«

Eftir formansfrágreiðing og gestarøðarar verður politiskt orðaskifti, har limir Tjóðveldisfloksins fara at umrøða politisku málini, valstríðið, samgongumøguleikar og annað.

Flokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum er opið fyri almenninginum og øll eru vælkomin, boðar flokkurin frá í tíðindaskrivi.

# - Í einum skúri...

**Tá Sosialurin vitjaði í Hvannasundi mikudagin, sóðu vit, at teir riggaðu til umborð á bátinum Tunnafjáll. Teir knústu goggu í einum gogguknúsara umborð, so egningin kundi halda fram, tá teir fóru út frá aftur**

ÚTRÓÐUR
*Birgir Waag Høgnesen*
*birgir@sosialurin.fo*





*Mai Fuglø er egningaforkvinna í skúrinum hjá John Simonsen í Hvannasundi - og hetta arbeiðið dámar henni sera væl*

*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

Tað er hvannasundsmaðurin John Simonsen, sum býr í Klaksvík, ið eigur bátin.

John rør út við einum Starlet 29, sum hann keypti fyri uml. trimum árðum síðani.

- Hetta er ein hampuliga góður bátur, men eg umhugsi at keypa mær ein størri, so eg vóni, at fiskiskapurin eydnast, so ráðini verða til tað seinri, sigur John.

Teir komu inn um trítíðina seinastu nátt við 1700 pundum av góðum toski. Vit landa í Norðdepli, sigur John, og prísurin liggur um 18 kr. fyri kilo, so hetta er á einari leið leggur hann afturat.

Tá vit høvdu prátað eina løtu við John, hoyrist ein kvinnurødd aftan fyri okkum, "tú John skulu vit trilla stamparnar oman", hann nikkar. Hann letur okkum vita, at Mai Fuglø, bróðirdóttirin, er formaður fyri egningini. Hon hevur trý, onkuntíð fýra fólk at hjálpa sær í skúrinum.

- Ófør, skal eg siga tær!

Vit spurdu Mai, hvussu tað bar til, at hon hevði valt starvið sum egningaformaður. Hon svarar, at hon var á flakavirkinum ´Norðfra´ í Norðdepli.

- Men fyri einum árið síðan fekk eg hetta í boði, og tað havi eg ikki angrað. Hetta er "ordiliga vell". John er lagaligur, og vit samstarva sera væl, so um einki annað betur finst, ja, so haldi eg bara fram her.

Tá vit spyrja Mai, hvat brúkt verður til agn, sigur hon:

- Vit brúka mest goggu, men topas og høgguslokkur verður eisini brúkt, men hetta avger John, tað hevur hann best skil fyri.

Meðan vit hava tosað, hava Mai, John og makkarin, sum skal við John henda túrin, koyrt teir seinastu stamparnar umborð; teir vóru 24 í tali. Vit ynska teimun góðan túr, og Mai góðan arbeiðshug.

# Ger fjøll og bjørg úr glasi

**Í hesum døgum eru glasverk hjá listamanninum Hans Andreasi Hansen at síggja í Heim-Design í Havn**

List
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



*Hans Andreas Hansen er fjølbroyttur listamaður, og í hesum døgum ber til at síggja ein part av list hansara í handlinum Heim-Design í Havn*

Leirvíkingurin Hans Andreas Hansen, sum býr í Esbjerg, er ein sera fjølbroyttur listamaður. Sum ungur dyrkaði hann sínar tónlistar- og sanggávur, seinni fór hann at slípa og brenna glas, og fleiri oljumálningar, sum hann hevur málað, hanga á veggjum ymsastaðni.

Tey seinnu árini hevur hann yvirhøvur hildið seg til tey handaligu evnini. Fyri tólv árum síðani fekk hann áhuga fyri at læra seg at slípa glas, og fyri fýra árum síðani fekk hann høvi at leiga seg inn á eitt brennarí at brenna glas. Tað mesta hevur hann lært seg sjálvan, men nøkur skeið hevur hann tikið.

Í ovninum verður glasið hitað til millum 300 og 800 stig, og tá er næstan ikki mark fyri, hvat tú kanst fáa burtur úr tí. Sum føroyingur brúkar hann ofta føroysk motiv so sum fjøll, bjørg, bátar og segl.

- Tað fellur líkasum løttast, sigur hann.

Tað eru fleiri, sum hava fingið eyguni upp fyri evnunum hjá tí fjølbroytta listamanninum úr Leirvík. Hann hevur gjørt glaslutir til Esbjerg kommunu og fyritøkuna Danske Firmagaver, hann hevur havt framsýningar í føroysku felagshølunum í býnum, og hann hevur havt framsýning á bókasavninum í Esbjerg-býarpartinum Sædding.

Framsýningin í Heim-Design í Havn er tann fyrsta hjá Hans Andreasi Hansen í Føroyum.